# BØNARLØTAN

**Januar** **2020** **35. árg.**

## GOTT NÝGGJÁR!

Eg rópi til Gud, hin hægsta, til tann Gud,
sum fullførir verk Sítt fyri meg. *Sálmur 57.3*

## *1. Mikudagur* *5. Mós. 9,1-14*




***Sóljan, bussurin hjá Sjúklingahotellinum, koyrir sjúklingar og avvarðandi regluliga til tiltøk í Kristnastovu.***



### DANMARK, Kristnastova
### Sólva og Jákup Hansen

Sólva hevur gjørt avtalu við Sjúklingahotellið Tórshavn at hjálpa til í ítrivsrúminum. Hvønn hósdag seinnapart stuðlar Sólva sjúklingum og avvarðandi við ymiskum handaligum ítrivi.

## KRINGVARPIÐ

12. jan. sjónvarpsandakt, Hjørleif Vang
19. jan. sjónvarpsandakt, Hjørleif Vang
19. jan. sjónvarpsmøti, Lívdin, Hoyvík
2. febr. útvarpsmøti, Nebo, Toftir

**R7** (meir á www.evr.fo)
Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## Møtir í Buli á Signabø

Fríggjakv. 3. jan. kl. 20. Sangur: John Færø.
Leygarkv. 4. jan. kl. 20. Kvartettin í Betesda.
Sunnukv. 5. jan. kl. 19. Manskórið í Ebenezer.
Verið vælkomin! Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, Arne Simonsen og Jákup N. Olsen.

## DANMARK, Hirtshals, Malta
## Anna og Hans Djurhuus



Takk fyri forbøn í farna ári! Samstundis ynskja vit øllum Harrans ríku signing í nýggja árinum.

## ONGLAND, NTM North Cotes
## Julie og Sonni Poulsen



Vit eru heima til 6. jan. Biðið, at enn fleiri fara út við gleðiboðskapinum, sum so ríkliga hevur signað okkum føroyingar. Biðið fyri skúlanum hjá NTM, at hann framhaldandi skal leggja næmingum lag á at bera teimum fjarskotnu frelsuboðskapin.

## *2. Hósdagur* *5. Mós. 9,15-29*

**DANMARK, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 12, Andreas10, Kristina 8**

Annaðhvørt týskvøld leiðir Niels Pauli lesibólk, sum hittist at práta um nakrar av stóru og torføru spurningunum, ið lesandi kunnu møta í dag. Vit vóna, at tað verður trúarstyrkjandi fyri tey, ið koma. Fríggjakvøldssamkoman byrjar aftur 10. jan.

## *3. Fríggjadagur* *Matt. 1,1-25*



**NTM, FØROYAR**
**Erla og Ingvard Petersen**

Ingvard heldur á at undirvísa í ymiskum samkomum henda mánaðin. Hann skal eisini tala á ungdómsstevnuni Change í Nebo á Toftum 23. - 25. jan.

## *4. Leygardagur* *5. Mós. 10,1-22*

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 2, Timon 0**

Vit flyta til Kovol fyrst í jan. Biðið, at vit sum familjur fáa gott samskifti við ættarfólkið og læra mentanina og málið at kenna, so vit kunnu boða evangeliið á teirra máli.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen,**
**Josva 10, Ester 9, Samuel 5**

## *5. Sunnudagur* *Matt. 2,1-23*



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

17. jan. - 3. febr. verða vit í Florida. Eg eri limur í báðum altjóða nevndunum hjá NTM og formaður í aðrari. Sjáldan eydnast at hava báðar nevndirnar á sama plássi, men tað er ætlanin hesa ferð. Judy er skrivari í báðum nevndunum, sum fundast nakrar dagar hvør sær, men eisini tveir dagar saman. Nógv er á skránni, tí avbjóðingarnar eru nógvar, men møguleikin at gera mun fyri Harran kring heimin er stórur. Okkum tørvar vísdóm og vegleiðing omanfrá.



### ÍSLAND, Akureyri, Agape Evropa
### Kristín Gerðalíð

Fýra gentur lesa skeið frá Emmaus í bíbliubólki. Tær eru áhugaðar at læra um Gud. Biðið, at allar koma til trúgv.

### ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn
### Rósa og Jógvan Purkhús

## *6. Mánadagur* *5. Mós. 11,1-17*



### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
### Inga McKendry

Í jan. er ætlanin at fullføra endaligu endurskoðaðu útgávuna av Markusar Evangelii. Síðan seta vit tekstin upp til prentingar og útgávu. Biðið, at mong lesa hesa frásøgnina um Jesus.

## *7. Týsdagur* *Matt. 3,1-17*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 17**

Eg kom fyri stuttum aftur úr PNG. Túrurin eydnaðist væl, og vit blivu lidnir at rættlesa Opinberingina. Eg fekk eisini nýtt tilfar til vega í Sorimi, sum eg kann viðgera heima.

## *8. Mikudagur* *5. Mós. 11,18-32*



**GUINEA VESTURAFRIKA,**
**Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 10**

Nú gleða vit okkum at koma til Føroya 14. jan. - 10. mars. Tá vóna vit at hitta so nógv sum møguligt. Marion hevur havt trupulleikar við tonnunum og gongur til tannlækna. Hon skal eisini til tannlækna nakrar fáar dagar, áðrenn vit koma heim.

⋆ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 16 ár

## *9. Hósdagur* *Matt. 4,1-25*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

Takk fyri forbøn og fíggjarligan stuðul. Simon hevur tað gott nú og er væl førur fyri at byrja í nýggja starvinum. Hann ferðast nógv og skal til Spania og Portugal 11. - 19. jan. at vitja trúðboðarar har. Dorit skal hjálpa í ECMI hálva tíð á skrivstovuni. Vit arbeiða heima, tá vit ikki ferðast. Vit takka Harranum fyri, hvussu vinarlig samkoman her í Taunton hevur verið ímóti okkum.

## *10. Fríggjadagur* *5. Mós. 12,1-16*



**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope, Tanja Mortensen**

Eini 30 ung hava luttikið í ungdómsbólki fríggjadag. Vit royna at menna tey til andaliga tænastu, t.d. at hava barnamøti.

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 9, Tabita 6, Debora 4, Natan 1**

Missiónsráðstevnan Reach fyri ung verður í North Cotes 26. - 30. mars 2020. Pláss er fyri fleiri! Kunning og tilmelding á ntm.fo.

★ Í dag fyllir Joy Tuohy 3 ár

## *11. Leygardagur* *Matt. 5,1-26*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
**Adonia 12**

Jan. og feb. eru halgaðir tænastuni á netinum. Ein Youtuberás og tveir Facebook bólkar bíða eftir líknandi virksemi á enskum máli. Ætlanin er at fara missiónstúr til Nepal í mars at kanna framtíðar møguleikar har. Okkum tørvar vísdóm at fyrireika túrin. Vónandi kann líknandi túrur gerast til Pakistan seinni í hesum árinum. Er áhugi at fylgja við tænastu okkara dagliga, er møguligt at gerast limur av „Missión Johannesen Familjan" á Facebook.

## *12. Sunnudagur* *5. Mós. 12,17-32*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Anna hevur nú havt sjúkueyðkenni í 20 ár, men er framvegis før fyri at vera rættiliga virkin. Dubby er nú ájavnt í aldri við pápan, tá hann doyði 73 ára gamal. Hann er takksamur fyri framvegis at megna tað mesta. Hann vónar, at ungur maður, ið hevur verið bundin av rúsdrekka til fyri stuttum, kemur at hjálpa honum tøkniliga. Vit fegnast um, at Augustin Thiandoum nú lutar orð Guds á saafi máli umvegis Facebook-live eins og í útvarpi.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 13, Rebekah 11, Lydia 9**

## *13. Mánadagur* *Matt. 5,27-48*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Fremsti tørvur okkara er, at onkur kemur yvir at stuðla okkum nú í vetur, so lættari hevði verið at hildið verandi barna- og ungdóms-møti gangandi, og manning kundi verið at farið undir nýggj tiltøk, m.a. at fara út á einar 3-5 grannabygdir, inntil drívísurin kemur seint í vár, tá vit ikki kunnu rokna við, at altíð verður siglandi.



**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *14. Týsdagur* *5. Mós. 13,1-18*




**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Cecilie 17, Kristian 15**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð, Liljan 13, Leanne 12, Luckas 0**
Fyrireikingarnar til legurnar eru byrjaðar. Vit biðja, at fleiri koma yvir at hjálpa til á legunum. Sunnudagsskúlin gongur væl. Eini 5 børn hjá familjum í samkomuni koma regluliga umframt eini 2-4 grønlendsk børn, sum koma av og á. 6 ung í aldrinum 13-17 ár hjálpa til í sunnudagsskúlanum.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *15. Mikudagur* *Matt. 6,1-34*



**FØROYAR**
**Maria og Jens Bech**
Vit eru Harranum takksom fyri árið, ið farið er. Í nýggja árinum eru bíbliutímar og vitjanir á skránni. Biðið um vísdóm til fjølbroyttu persónligu uppgávurnar í tænastuni!
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 12**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**

## 16. Hósdagur 5. Mós. 14,1-29



**FØROYAR, Atlantic Mission**
**Birgit og Svenning av Lofti**

Skipað verður fyri 7-daga ferð til Skotlands og Hetlands seinastu vikuna í aug. Heitið á ferðini er: „Í fótafetum Willam G. Sloans“. Vitjað verður ymsastaðni, m.a í Dalry – heimbýi W. G. Sloans og á oynni Papa Stour í Hetlandi, haðani Sloan á fyrsta sinni kom til Føroya í 1865. Nærri kunning seinni. Vit fyrireika okkum eisini at vera ferðaleiðarar á ísraelsferð á páskum. Minnist eisini fyrireikingarnar til Atlantic Mission ferðina í Føroyum við Juvel II í apríl-mai.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 12, Svend 11, Terji 7, Petra 6**

★ Í dag fyllir Hadassa Christiansen 9 ár

## 17. Fríggjadagur 5. Mós. 15,1-23



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit ynskja tykkum eitt av Harranum vælsignað nýggjár! Mong komu til møtini í Calvary Church í des. og hoyrdu evangeliið bæði í talu og sangi.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Leygardagur* *Matt. 7,1-29*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 15, Victoria 13,**
**Emma Grace 12, Jónatan 10,**
**Markus 7, Evita 4, Joy 3**

Vit umhugsa at opna bókahandil og selja bíbliur til rímiligan prís og annan andaligan lesnað. Ein kristin bókahandil er í býnum, men har er dýrt at keypa; tí koma fólk til okkara at spyrja, um vit hava bíbliur til sølu, sum tey ynskja at geva sum gávu ella at hava sjálv. Biðið, at vit fáa hóskandi høli at leiga.

**FILIPSOYGGJAR, NTM, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 16, Rebekka 14, Hanna 11**

**FILIPSOYGGJAR, NTM, Manila**
**Liz og Ragnar Niclasen**

## *19. Sunnudagur* *5. Mós. 16,1-22*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru nú í Onglandi, meðan Annika fær útbúgving sum ráðgevi. Stephen ferðast kortini til Turkalands av og á í tænastuni; annars taka vit lut í samkomuarbeiðnum her. Samkoman í Turkalandi lærir meira at standa á egnum beinum, nú so nógvir trúboðarar og pastorar verða útvístir. Tey læra eisini sjálv at taka meir ábyrgd.

## *20. Mánadagur* *5. Mós. 17,1-20*



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 11, Noah 10, Karis 6,**
**Judah 4, Ethan 2**

Vit eru Gudi takksom fyri góðsku og trúfesti í farna ári. Hópin av ókendum viðurskiftum hava givið okkum møguleika at vaksa og læra. Biðið, at samkoman verður virkin at arbeiða fyri einleika.

**USA, Nebraska, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 17**

## *21. Týsdagur* *Matt. 8,1-34*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 8**

Vit stuðla Jakob og Linu Nachtigall og teirra synum. Tey arbeiða millum Konyagifólkið í Guinea í Vesturafrika. Biðið, at tey verða til reiðar við umsetingar- og frálærutilfari, so tey kunnu kunngera gleðiboðskapin í 2020 fyri fyrstu ferð á fólksins máli.

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 9, Leah Ève 6, Abigail 0**



## *22. Mikudagur* *5. Mós. 18,1-22*



**DANMARK**
**Susan og Øssur Berghamar**
Vit halda á at vitja, stuðla og taka lut í verkinum í Kristnastovu í nýggja árinum. Samstundis gleðast vit um, at Jákup og Sólva nú eru partur av toyminum her. Takk fyri samfelag og forbøn í mong ár! berghamar@kristnastova.dk

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam 15, Noah 13, Lydia 2**

## *23. Hósdagur* *5. Mós. 19,1-21*



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Eg geri meg kláran til túrin til Filipsoyggjar í mars, umframt at vit gera klárt at flyta inn í nýggja íbúð.

## *24. Fríggjadagur* *Matt. 9,1-17*



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 10, Nana 8, Louie 6, Rio 0**
Biðið fyri okkara shogikafé í samkomuni. Vanliga møta fýra, men onkuntíð fleiri. Biðið, at onnur eisini koma, og at teir báðir, ið ikki eru trúgvandi, koma til trúgv.

## *25. Leygardagur* *Matt. 9,18-38*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Ein maður úr USA kemur í jan. at kanna 1. og 2. Tessalonikabræv og Opinberingina, sum eg havi umsett, umframt kapitlar úr Josva, sum ungur maður úr bygdini hevur umsett. Saman við fleiri málhjálparum rættlesi eg kladdurnar av brøvunum, eg havi týtt seinastu tíðina. Ungi maðurin er nú eisini liðugur við 1. Mósebók og fer so undir at umseta Jónasar bók. Biðið, at Harrin varðveitir ungu dreingirnar, sum vanliga koma til bíbliutímarnar, men nú eru farnir burtur í aðra bygd at taka framhaldsdeildina.

## *26. Sunnudagur* *5. Mós. 20,1-20*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Gott nýggjár! Hetta er nýggja møtiætlan okkara: Andalig gullkorn mánadag, bíbliubólk hóskvøld, møtir sunnudag í Fredericia og í Rødovre. Biðið, at vit megna at bera teimum deyvu livandi orð við hjálp Anda Guds.

**DANMARK, Glostrup Frikirke**

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 17, Megan 15, Trisha 7, Emma 3**

## 27. Mánadagur — 5. Mós. 21,1-23




### VENESUELA, Puerto Ordaz
### Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Enn verður leitað dúgliga eftir hóskandi og tryggum íbúðum til bíbliuskúlan. Enn er einki flúgvarabensin at finna í landinum, og tískil eru flestu trúboðarar komnir til býin, meðan teir bíða eftir at sleppa innaftur í ættarbólkarnar. Sanomatoymið vitjaði ættarbólkin aftur fyri stuttum. Tað tók seks dagar at ferðast niðan eftir ánni. Tvær vikur vórðu brúktar til vitjan, at uppbyggja samkomuna og at rættlesa lesitilfarið, sum júst er gjørt liðugt til skúlan. Nurimar hjálpir nú toyminum at gera lesibøkurnar heilt lidnar.

## 28. Týsdagur — Matt. 10,1-20

### OM-FØROYAR

Vit takka Harranum fyri eitt gott 2019, har vit fingu nýggjan dagligan leiðara. Vit eru spent uppá 2020! Hetta árið gera vit fyrireikandi arbeiði til nýtt OM virksemi í Íslandi. Jóhan Petur Johannesen hevur ábyrgdina.

★ Í dag fyllir Adonia Johannesen 12 ár

★ Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 12 ár

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## *29. Mikudagur* *Matt. 10,21-42*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 14, Aron 7, Noah Kristian 6**

Nógv nýggj fólk eru vorðin partur av okkara samkomu. Biðið fyri tænastuni teirra millum; tey koma úr 15-20 ymiskum londum. Vit uppliva eisini plásstrot, tí so mong koma í løtuni. Okkum tørvar vísdóm!

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 6, Micah 6**

## *30. Hósdagur* *5. Mós. 22,1-30*

**ZAREPTA**

Arbeitt verður týsdagar og fríggjadagar í vetur; endin á Heimarulon skal klæðast, gamla svimjihøllin takast niður og elevatorurin í Ovaru Lon skiftast. Allar hjálpandi hendur vælkomnar. Napoleon Vang, tel. 214992, Símun Pætur á Torkilsheyggi, tlf. 747111 og Birgir Andreasen, tlf. 554680.

- ★ Í dag fyllir Petra í Prestgarði 6 ár
- ★ Í dag fyllir Tabita Christiansen 6 ár

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

*31. Fríggjadagur* *5. Mós. 23,1-25*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni í Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**Elsket af Ham**
**Andagter til hele året**
**220 kr.**

Andaktir til hvønn dag í árinum. Line Nielsen sigur í formælinum, at alt byrjar við Honum. Uttan Hann var onki til. Um Jesus ikki elskaði meg, so var lív mítt tómt og kalt og myrkt og deytt. Alt byrjar við, at Hann elskar meg, og hvønn dag tørvar mær at geva meg í kærleiksfullu hendur Hansara. Bøn høvundans er, at tú møtir Honum, og hvønn dag í árinum kennir kærleika Hansara.




Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos